# – Óført stað at vaska bátin



*Dánjal Hentze hevur arbeitt eina lítla løtu uppá bátin her á bedingini í Skálavík. – Hetta er eitt óføra hent stað, sigur hann*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Útróðrarmaðurin Dánjal Hentze fegnast um lítlu bedingina í Skálavík. Her kunnu menn taka bátar sínar upp til smærri umvælingar og vask. Og tað var júst tað hann gjørdi týsdagin í farnu viku**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*

Skálavík: Froyurin stendur frá trýstspularanum á teirri lítlu bedingini í Skálavík.

Uppi á bedingini stendur Vesturfarið og í arbeiði henda dagin er eigarin, Dánjal Hentze.

Báturin er komin upp fyri løtu síðani og her er eingin tíð at spilla: Arbeiðast má, nú báturin er komin uppá pláss her í Skálavík.

Sjálvur er Dánjal í oljuklæðum, tí tað krevst, tá tú arbeiðir soleiðis við einum trýstspulara.

Og væl gongur at reinsa botnin, tí bæði umstøðurnar og útgerðin eru skræddarseymaðar til hetta arbeiðið og til bátar av slíkari stødd.

- Jú, hetta er eitt hent tiltak, teir hava her í Skálavík. Var hetta ikki her, so noyddust vit aðrastaðni at gera tað sama.

- Men tað er ikki neyðugt hjá okkum. Vit hava hetta fína staðið her, sigur Dánjal Hentze.

Hann vil helst sleppa aftur til arbeiðið sítt. Vesturfarið skal reinsast og spulast, onkur smærri umvælingin gerast, og so skal leggjast til brots aftur.

Streymurin er harður henda dagin, og tí er hóskiligt at taka bátin upp beint nú. Men streymurin linkar fram móti vikuskiftinum.

## Vónar terra

Dánjal Hentze hevur átt henda útróðrarbátin, sum upprunaliga er íslendskur, í átta ár.

- Hann hevur roynst mær væl, sigur Dánjal.

Sum allir aðrir bátar hevur hann tørv á at reinsa botnin við millumbilum, og tískil hevði hann fingið sær tíð á bedingini í Skálavík henda týsdagin í farnu viku.

Hann tók bátin upp kl. 9 henda morgunin. Og her fór hann beinanvegin til arbeiðis við at vaska botnin.

- Onkur onnur smærri umvæling skal eisini gerast, eins og botnurin skal smyrjast.

- Verður terri í morgin, so vænti eg at verða liðugur tá, og so fari eg at rigga til enn ein útróðrartúr, sigur Dánjal.

## 300 pund

Dánjal er einsamallur á bátinum, og hann plagar at royna bæði eystanfyri og vestanfyri við snelluni.

- Í ár hevur verið lítið av fiski at fingið.

- Men tað hava hinvegin verið rættiliga nógvir dagar, so tað er altíð blivið til eitt sindur, sigur hann.

Dagin fyri hann tók bátin upp – t.v.s. mánadagin í farnu viku – var hann á útróðri og fekk tá nakað niðanfyri 300 pund.

- Meiri var tað so ikki, sigur Dánjal.

# 25 stammbátar um árið



*Palli Olsen hevur dagligu umsitingina við bedingini. – Bátarnir koma higar líkasum í bylgjum – serliga uppundir harðan streym, sigur hann*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Útróðrarmonnum í Skálavík dáma væl hesa bedingina. Og tað gera eisini útróðrarmenn í Sandoynni og aðrastaðni við**

BÁTAR
*Snorri Brend*

**Skálavík:** - Bátaeigararnir, - teir lata væl at hesum staðnum.

- Teir siga, at tað er gott at bátarnir standa so høgt, og at tað er so lagaligt at sleppa til og frá hesum staðnum.

Tað sigur Palli Olsen, sum hevur hesa bedingina undir sær, sum ein part av sínum arbeiði fyri Skálavíkar kommunu.

Vanliga verða einir 25 bátar tiknir upp á bedingina um árið - onkutíð fleiri, og onkutíð færri.

- Flestu bátarnir er her eina ferð um árið. Ja, vit hava fleiri stammkundar, sigur hann.

## Her ella aðrastaðir

Seinast í sjúti-árunum avgjørdi bygdarráðið í Skálavík at broyta bátadráttin soleiðis, at bátaeigararnir í bygdini kundu fáa betri umstøður – soleiðis at meiri varð at líkna við eina lítla beding.

Ein vognur varð gjørdur, og kundi hesin taka upp smærri útróðrarbátar – 10 tonsarar og sekséringar.

Hetta varð gjørt fyri at lætta um hjá bátunum í bygdini. Var hesin møguleikin ikki tøkur, vóru teir noyddir at fara aðrastaðni við bátunum – kanska heilt inn á Strendur.

Hetta var tikið væl undir av útróðrarmonnunum í bygdini, og í restini av oynni eisini.

- Ja, tað er eisini komið fyri, at bátar aðrastaðni frá eru komnir higar, sigur Palli.

Bátarnir koma ofta líkasum í bylgjum, og serliga uppundir harðan streym

## Lagaligir

Kostnaðurin fyri eitt uppihald á bedingini í Skálavík er sera rímiligur – einans 1000 kr. fyri tveir dagar. Tá er lán av trýstspulara íroknað prísin.

Kommunan er eisini lagalig, tí menn skulu eisini hava møguleika at mála bátin. Er sjaskveður, og teir ikki fáa málað, so er kommunan til at tosa við.

- Annars so taka vit 200 kr. eyka um dagin, um báturin stendur longri enn ásett.

- Hetta er gjørt fyri at menn ikki skulu brúka hetta plássið sum eitt parkeringspláss fyri bátar sínar, sigur Palli.